# Føroya Symfoniorkestur fagnar Mozart

**Føroya Symfoniorkestur hevur konsertir 6. og 7. mai í Fríðrikskirkjuni og í Norðurlandahúsinum**

KONSERT

27. januar í ár vóru liðin 250 ár síðani ivaleyst størsta musikalska flogvitið nakrantíð, Wolfgang Amadeus Mozart, var borið í heim.

Í hesum sambandi fer Føroya Symfoniorkestur at hava stórfingna konsert í Fríðrikskirkjuni leygardagin 6. og sunnudagin 7. mai í Norðurlandahúsinum við seinasta verki Mozarts: REQUIEM (K.V. 626) og einari av hansara kendastu klaverkonsertum (K.V. 466) á skránni.

Solistar:
Sopran: Bergljót Poulsen
Alt: Elsa Súsanna Dalsgarð
Tenor: Eyðálvur Eyðálvsson
Bass: Ágúst Ólvsson
Klaver: Jóhannes Andreasen
Dirigentur: Bernhard Wilkinson

**Requiem í d. moll K.V 626**

Requiem í d-moll eftir W. A. Mozart er seinasta verkið úr hansara hond. Hann náddi ikki at fullføra tað, áðrenn hann doyði, so tað gjørdist næmingur hansara, Franz Süssmeyer, sum legði seinastu hond á verkið. Süssmeyer hevur sjálvur skrivað nøkur verk, men hóast hesi ikki siga frá serligum íblástri, so hevur tað eydnast honum á virðiligan hátt at fullføra verk Mozarts.

**Klaverkonsert nr. 20 í d-moll (Köchel Verzeichnis 466)**

Av øllum klaverkonsertunum hjá Mozart, so er hendan í d-moll tann, sum mest boðar frá tí komandi romantiska tónleikinum. Tað døkka, eggjandi og ógvusliga tónamálið kann fáa ein at hugsa um Beethoven og Schumann. Tí var tað kanska, at fólk í 19. øld dámdu so væl hesa konsertina, so at í eitt tíðarskeið varð næstan bert henda at hoyra á konsertum. Hetta var jú tann tíðin, tá romantikkurin var í hásæti.

PS Gjøllari umtala av verkunum kemur seinni.



*Børnini hugna sær óført á bókasavninum, har tey hava klipt páskaprýði. Lítla Sólvá, sitandi við bakinum til, litar eitt páskaregg*

# Páskaklipp fyri børn

**Hósdagin tann 6. apríl vóru vit uppi á býarbókasavninum í miðbýnum í Havn. Í mong ár hevur býarbókasavnið skipað fyri ymiskum klippitiltøkum fyri børn undir skúlaaldur, og hesa ferð er tað páskaklipping**

PÁSKIR

*Rannvá Næs Guttesen/*
*Lilja Holm Mortensen*
*Praktikantar*

Býarbókasavnið hevur hvørt ár ymisk tiltøk fyri børn, har tey smáu hava høvi til at klippa. Hetta hava tey gjørt í nógv ár. Á jólum klippa tey jólapynt, á føstulávint klippa tey føstulávintspynt, og nú beint upp undir páskir klippa børnini páskapynt.

Hetta dámar børnunum heilt væl, sigur bókavørðurin Malan.

Páskalippingin hósdagin var bert fyri børn undir skúlaaldur. Tað koma eini 20 til 30 børn at klippa.

– Vit hava markerað tað niður til børn undir skúlaaldur, tí um tað høvdu komið eini 50 børn hevði tað verið ov ringt at hildið skil á teimum, og hølini eru ikki nóg stór til tess, sigur bókavørðurin Malan.

Hetta er ikki bert fyri stovnar, men eisini foreldur við børnum.

Alt tilfarið, ið børnini nýta, sum t. d. papp, lím og farvur, fáa tey útfiggjað frá bókasavninum. Børnini klippa páskaharur, páskaregg og ymiskt annað, sum hevur okkurt páskapreg. Summi børn lesa eisini barnabøkur, og tey sleppa eisini at fáa eina bók heim við um tey vilja.

Vit her á bókasavninum vilja vísa børnunum, at eitt bókasavn er meira enn bert bøkur. Vit vilja venja tey við at vera her á staðnum, og vónandi minnast tey, tá tey blíva eldri, at her eisini eru bøkur, sigur Malan.

Børnini hugna sær óført, og alt tað, ið tey klippa, fáa tey heim við. Eisini fáa tey eina sjokolátapáskaharu heim við sær.

**Sólvá dámar væl at klippa**

Vit høvdu eitt lítið prát við eina fitta, lítla gentu, ið eitur Sólvá.

Sólvá dámar væl at vera á bókasavninum og klippa. Sólvá litaði eitt lilla páskaregg, sum hon sjálv hevði klippt. Tað var sera vakurt. Sólvá gleðir seg nógv til páskafrítíðina, og hon hevur pyntað nógv páskapynt heima við hús. Hon var ikki vís í, hvat hon ætlaði at gera í páskafrítíðini, men at rulla páskaregg, tað fór hon.

Vit spurdu hana eisini, um hon hevði keypt nógv páskaregg, og hon svaraði so fitt.

– Nei ikki enn, men mamma fer at keypa.

# Ein sorgblíður klikkheysur og ein ovfarakát lama á asfalt

**Asfalt sær út til at gerast eitt óvanliga spennandi og fjølbroytt tónleikatiltak, dagurin í gjár lýsti hetta stóra fjølbroytni, tá tveir av bestu nýggju bólkunum í Føroyum vórðu avdúkaðir. Petur Pólson og Lama Sea standa sum markantastu umboðini fyri hvørt sítt rák í føroyskum tónleiki**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tað hevur í fleiri ár verið tosa um tvey ymisk rák í føroyskum rokktónleiki, tann sorgblíði heldur tungi rokkurin úr Eysturoynni og tann glaði og festligi rokkurin úr høvuðsstaðarøkinum. Tað myrka og tað ljósa. Hetta er ein heldur yvirdrivin algilding, men ikki heilt burturvið alíkavæl. Bólkar, nøkur av størstu nøvnunum, ið umboða og hava umboða Eysturoyar rákið eru Clickhaze, Gestir og Petur Pólson, meðan bólkar sum Lama Sea, Páll Finnur Páll og 200 umboða haynarrákið.

Í gjár avdúkaði asfalt, at júst Petur Pólson og Lama Sea spæla á tiltakinum í Tórsgøtu í summar.

**Lívsglaðu Lama Sea**

Lama Sea er ivaleyst Føroya glaðasti bólkur, allur bólkurin strálar av lívs- og spæligleði á pallinum, ein gleði, ið smittar øll, sum hoyra, síggja og kenna hana.

Lama Sea hevur gjørt vart við seg, við fangandi løgum sum "Some Balance", "Everything I Touch Turns Into Gold", "He Kicked My Ass" og "Woody Allen". Hesi løg eru altíð við til at gera konsertupplivingarnar góðar.

Bólkurin hevur nøkur ár á baki, og luttók millum annað á undirgrundsfløguni Ampaljóð. Men Lama Sea fekk sítt veruliga gjøgnumbrot, tá bólkurin spældi seg í Prix Føroyar semifinaluna í fjør. Lama Sea spældi síðan á MjúS, G! og Ólavsøkukonsertini, umframt nógvum øðrum tiltøkum.

Í vetur gjørdist Lama Sea nummar tvey í Global Battle Of The Bands og spældi á Nýggjárskonsertini. Harumframt hevur Sjónvarpið sent konsert við bólkinum í Meiarínum allan vetur. Lama Sea var bæði í uppskoti til planetina fyri besta bólk og besta nýggja bólk ella einstakling. Sangarin í bólkinum Janus Rasmussen var í uppskotið til planetina sum besti sangari.

**Sorgblíði Petur**

Petur Pólson hevur útgivið eina frálíka útgávu, sum er merkt av myrkum og køldum sinnalagi. Fløgan er meistaraliga framleidd, og eitt must hjá teimum, ið eru áhugað í føroyskum rokktónleiki, skrivaði ummælarin í Sosialinum millum annað um fløguna "Koma" hjá Peturi Pólsyni.

Petur Pólson hevur verið virkin í føroyskum tónleiki í nógv ár í bólkum sum Visible Fish og Clickhaze. Petur var í 1999 oddamaður í tveimum bólkum í Prix Føroyar finaluni, og í 2001 vann hann Prix Føroyar við Clickhaze. Í fjør var Petur á fyrsta sinni at hoyra solo. Hetta hevur, sambært Peturi sjálvum, givið honum nógv leysari teymar til at gera tað, sum hann hevur hug til. Við sær í bólkinum hevur Petur royndar og dugnaligar tónleikarar, ið saman við Peturi skapa eina myrka og vakra ljóðmynd.

Petur vann M.A. Jacobsens virðislønina fyri fagrar bókmentir í 1997. Fløgan hjá Peturi "Koma" var í uppskoti sum besta fløga bæði hjá Dimmalætting og á Planet Awards og Petur var sjálvur eins og Lama Sea í uppskoti til planetina fyri besta nýggja bólk ella einstakling. Hetta er stutt sagt ein listarmaður, ið einki hevur at prógva.

**Fjølbroytt asfalt**

Við hesum nøvnum hevur asfalt tryggjað sær tvey av markantastu nøvnunum innan tvey av sterkastu rákunum innan føroyskan tónleik. Vitjað asfalt og les um øll tey føroysku tónleikanøvnini, ið longu eru avdúkaði á heimasíðuni www.asfalt.fo